# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit kunnu ikki forða bilbumbum og øðrum bumbum í Bagdad. Tað slepst ikki undan teimum*

*(David Petraeus, generalur)*

# Sótu seks dagar í einum tunli



*Ísraelski verjumálaráðharrin, Ehud Barak, gekk í gjár við til at lata nakrar hundrað palestinar sleppa úr Gaza-geiranum til Vestara Áarbakka. Teirra millum vóru hesi hjúnini við fýra børnum, sum høvdu sitið seks dagar í einum tunli á markinum og bíðað eftir hjálp, eftir at tey vóru flýdd undan Hamas*

# Clinton gav hall

**Í Bergen var áhugin fyri at hoyra fyrrverandi amerikanska forsetan ikki so stórur, sum fyrireikararnir væntaðu, og tað kostar**



*Í Bergen og Oslo høvdu fyrireikararnir hall av Clinton-vitjanini herfyri*

Tema Foredrag AS væntaði, at tað fór at bera til at fylla ta stóru Grieg-høllina, tá Bill Clinton skuldi halda fyrilestur har tann 22. mai, og at fólk vóru til reiðar at gjalda ímillum 1.990 og 2.990 norskar krónur fyri at sleppa inn.

Men fyrst í mai vóru bara 700 atgongumerki seld. Tað eydnaðist fyrireikarunum at fáa fleiri fyritøkur at keypa atgongumerki til síni starvsfólk, men tó við munandi avslátti, og tey seinastu atgongumerkini fóru heilt einfalt fyri einki, skrivar Bergens Tidende. Úrslitið er, at fyrireikararnir nú sita eftir við einari stórari rokning, skrivar blaðið.

Bill Clinton var eisini í Oslo, og Top Event, sum skipaði fyri tiltakinum har, fekk heldur ikki tað nógva burturúr. Felagið sigur við Bergens Tidende, at vitjanin er ikki uppgjørd enn, men at úrslitið verður hall.

# Hann stillar kortini ikki upp

**Borgarstjórin í New York, Michael Bloomberg, fer ikki at royna at gerast forseti**

So seint sum í gjár varð roknað við, at tann floksleysi borgarstjórin í New York, Michael Bloomberg, ætlaði sær at stilla upp til amerikanska forsetavalið næsta ár sum uttanflokkavalevni. Men so verður ikki kortini.

-Eg eri ikki valevni, og eg ætli mær at halda fram sum borgarstjóri, til valskeiðið endar í 2009, segði Bloomberg í gjárkvøldið.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at boðini frá tí umstrídda borgarstjóranum eru ikki greiðari enn so, at tað kann væl henda, at hann ætlar sær at stilla upp á forsetavalinum í 2012. Tað verður framvegis sum uttanflokkavalevni. Tann 65 ára gamli Michael Bloomberg hevur verið limur í bæði demokratiska flokkinum og republikanska flokkinum, men er farin úr báðum.




*Michael Bloomberg er ikki bara borgarstjóri, men eisini ríkmaður. Hann sigst eiga næstan 30 mia. krónur*

## STUTT SAGT

### Brotsmenn dømdir

Ein dómstólur í afrikanska landinum Sierra Leone hevur dømt tríggjar fyrrverandi uppreistrarleiðarar sekar í ellivu ymsum ákærum um krígsbrotsverk. Teir tríggir stóðu á odda fyri uppreistrarherinum AFRC undir borgarakrígnum í Sierra Leone frá 1991 til 2002. Í gjár dømdi rætturin teir sekar í ágangi ímóti sivilfólkinum, tilvildarligum drápum, neyðtøkum, ránum og fyri at hava havt trælir. Teir tríggir noktaðu seg sekar í øllum ákærunum. Rættarmálini í sambandi við borgarakríggið í Sierra Leone halda fram , og millum tey ákærdu er fyrrverandi forsetin í grannalandinum Liberia, Charles Taylor.

### Stór broyting

Viðurskiftini millum Norðurkorea og umheimin eru batnað munandi, eftir at norðurkoreanska stjórnin hevur fingið fatur á pengum, sum amerikanarar løgdu hald á í einum kinesiskum banka fyri nøkrum árum síðani. Í hvussu er skal ein av teimum fremstu amerikonsku samráðingarmonnunum, Christopher Hill, til Norðurkorea at vitja, skriva amerikanskir og japanskir fjølmiðlar. Samstundis hevur norðurkoreanska stýrið játtað ST at senda eygleiðarar til landið at kanna landsins kjarnorkuútgerð. Tað var óhugsandi fyri nøkrum mánaðum síðani.

### Øði um aðalsheiti

Í tí muslimska partinum av heiminum eru fólk í øðini, eftir at rithøvundurin Salman Rushdie hevur fingið aðalsheiti í Bretlandi. Í Pakistan, Iran og Malaysia hava fólk í túsundatali mótmælt bretsku avgerðini, sum tey siga vera eina háðan ímóti islamsku trúnni. Serliga beiskur var pakistanski ráðharrin í trúarviðurskiftum, Mohammed Ajaz ul-Haq. Á einum tíðindafundi segði hann, at bretska avgerðin rættvísger sjálvmorðsatsóknir.